# REGLUGERÐ
## fyri
## flotbrúgvahavnina

§ 1

Flotbrúgvahavnin skal bert verða nýtt til smábátar í stødd upp til umleið seksæringar.

§ 2

Tá ynskt verður leguplass í havnini, skal umsókn verða send Fuglafjarðar havn, att. Havnaskrivstovuni um hetta. Í umsóknini skal bátastøddin (longd og breidd) gjølla verða uppgivin, og harumframt møguligt navn og skrásetingarnummar.

§ 3

Tá ið umsóknin er játtað, verður leiguavtala og reglugerð undirskrivað, og tá ið fyrsta hálvársgjald verður goldið fær viðkomandi eitt legunummar og kort, sum gevur atgongd til flotbrúgvarnar og tilseting til elveiting.

Legunummarið er ogn hjá Fuglafjarðar havn, og skal hetta verða fest á bátin á sjóndskum stað.

§ 4

Ikki er loyvt einum leigara at leiga plássið víðari til onnur.

§ 5

Tann til eina og hvørja tíð av býráðnum ásetta ársleiga, skal verða goldin frammanundan fyri hvønn árshelming við eini helvt 1. januar og 1. juli. leigan verður fakturerað av kommununi og send skrásettum leigar beinleiðis.

Um leigan ikki verður goldin í rættari tíð, ella leigarin ikki heldur tær fyri havnaina ásettu reglur, skal kommunan kunna krevja leigumálið avtikið beinanvegin.

Líkamikið nær í hálvárinum, leigumálið tekur við ella heldur uppat, verður upphæddin altíð ½ ársgjald.

§ 6

Bátar og aðrir tilhoyrandi ognarlutir hjá leigara, sum liggja í havnini, eru fyri eigarans egnu ábyrgd.

§ 7

Ansast má væl eftir ikki at skaða brúgvar, bummar og aðra útgerð í havnini.
Møguligir skaðar, ið verða gjørdir, má viðkomandi sjálvur endurgjalda.

§ 8

Tað er ikki loyvt at kasta órudd í havnina, heldur ikki fiskaavfall vm. Átalurætt hevur havnaumsjónin.

§ 9

Tað er ikki loyvt at leggja nakað eftir sær á brúgvunum ella á økinum sum heild. Heldur ikki má nakað verða hongt uppí ella liggja á bummunum.

Áherðsla eigur at verða løgd á, at bátar verða hildnir lens, so teir ikki koma at hanga í bummum og grannabátum.

§ 10

Bátar mugu ikki verða lagdir aðrastaðni inni í havnini, enn teir til endamálið gjørdur básar.

§ 11

Sigling inni í havnini skal fara fram við størsta varsemi og altíð við lítlari ferð max. 2-3 míl.

§ 12

Leigarin hevur annars skyldu at fylgja øllum møguligum boðum frá havnamyndugleikunum viðurskiftunum í havnini viðvíkjandi.

Fuglafjørður, tann / 2006

Sum ánari: Sum leigari:

Fuglafjarðar havn

________________________ ______________________________

Jón Nolsøe Olsen
havnameistari